

# Fólk á ferð

STRANDFARASKIP LANDSINS

STRANDFERÐSLUNI **TØRVAR EIN BÁT AFTRAT**

***Marin stýrir ferðsluni*** *kring landið*

TVÆR VIKUR GJØRDUST TIL **30 ÁR**

ÓKEYPIS – VETUR 2016/17

03 STRANDFERÐSLUNI TØRVAR EIN BÁT AFTRAT

05 ÁHALDANDI ÁBØTUR FARNU ÁRINI

06 MARIN STÝRIR FERÐSLUNI KRING LANDIÐ

09 TÁ ÓDNIN BRAST Á 10. SEPTEMBER

10 GANGA MONGUM SERYNSKJUM Á MØTI

14 KÓPAKONAN DREGUR FÓLK Í KALSOYNNA

16 Á FERÐ VIÐ FUGLUNUM

20 TRÓNDUR RØKTI LEINGI SKÁLAFJARÐAR-SIGLINGINA

22 VIÐ RITUNI TIL SVÍNOYAR OG FUGLOYAR

24 TVÆR VIKUR GJØRDUST TIL 30 ÁR

27 BETRI INTERNET UMBORÐ Á SMYRIL

28 THE PUBLIC TRANSPORT COMPANY OF THE FAROE ISLANDS


STRANDFARASKIP LANDSINS


**FÓLK Á FERÐ**

**ÚTGEVARI**
Strandfaraskip Landsins

**ÁBYRGD**
Hilmar Eliasen, stjóri

**SKRIVAÐ**
Eyðhild Jacobsen
Uni Arge
Silas Olofson

**UPPSETING OG SAMSKIPAN**
Sendistovan

**PRENT**
ArcoRounborg

**FORSÍÐUMYND**
Ólavur Frederiksen

**ONNUR MYNDAFÓLK**
Høgni Heinesen, Petur Poulsen,
Marita Gulklett og Sosialurin





# Strandferðslan verður **100 ár**

Næsta ár eru liðin 100 ár, síðan landið tók yvir Smiril frá Mortensens monnunum á Tvøroyri. Hetta var í mai 1917, tá ið A/S J. Mortensen seldi Smiril til Færøernes Amtskommune.

Fyrstu árini var árligi almenni stuðulin til raksturin 12.000 kr., og eins og nú var strandfarasiglingin hvørt ár til viðgerðar í løgtinginum. Serliga roknskapurin hjá Smirli og spurningar um ferðaætlan, lønir, takstir og semju við postverkið fingu nógva umrøðu.

Óneyðugt er at siga, at broytingarnar og frambrotini á samferðsluøkinum hava verið stór hetta 100 ára skeiðið, og í dag fylla serliga undirsjóvartunlar nógv í almenna kjakinum. Nýliga vórðu brævbjálvar við tilboðum fyri heilar 2 milliardir krónur latnir upp.

Strandferðslan sum flutningsfyritøka fegnast um, at flutningsmøguleikarnir alsamt batna, men í hesum meldrinum er sera týdningarmikið ikki at gloyma tann partin av fólkinum, sum enn bara hevur sjóvegis samband at dúva uppá og fer at hava hetta sambandið í mong ár aftrat.

Strandferðslan hevur eina lógarásetta skyldu at røkja fólka- og farmaflutningin so væl sum gjørligt, men veruleikin er, at vit so dánt megna at uppfylla hesa skylduna, tí rakstrargøgnini eru gomul og slitin.

Greitt er, at Strandferðsluni tørvar ein skjóttgangandi bát at taka til tær mongu ferðir árliga, ið onnur skip ikki eru tøk. Hesin báturin hevði spart landinum munandi upphæddir í rakstri, tí í løtuni er neyðugt at leiga privatar eykabátar, sum ikki altíð eru tøkir, tá føstu skipini fara í dokk, mugu takast úr sigling brádliga ella sigla við farmi.

At Strandferðslan sum fólkaflutningsfyritøka bara skal hava umbygda útróðrarbátin, Súluna, at seta í sigling, tá hini skipini ikki eru tøk, er óvirðiligt. Í grein í blaðnum verður tørvurin á eykabátinum lýstur nærri.

Í „Fólk á ferð“ hesaferð bjóða vit fleiri aðrar áhugaverdar greinir. Vit hitta ferðslusamskiparan, sum hevur tamarhald á ferðsluni kring landið, og vit hitta stýrimannin, sum í 30 ár hevur siglt við ferðafólki til Skúvoyar. Eisini eru greinir um fuglalív í oyggjunum, strandfaraskipið Trónd og siglingarleiðir í Norðoyggjum.

Góðan lesihug!

*Hilmar Eliasen, stjóri*
*Strandfaraskip Landsins*





# Strandferðsluni **tørvar ein bát aftrat**

Hevði Strandferðslan havt ein bát aftrat á støðd við t.d. Sildberan, hevði hann verið í rakstri meginpartin av árinum, tí tørvur er mangan á einum avloysarabáti, sigur Hilmar Eliasen, stjóri á Strandferðsluni. Skip skulu í dokk ella loysa seruppgávur, og tá tað hendir, má avloysarabátur vera tøkur

Strandferðslan røkir sjey siglingarleiðir í Føroyum, og tann áttanda, leiðin til Mykinesar, verður rikin privat. Tá skipini ikki eru í dokk ella loysa seruppgávur, heldur ferðaætlanin, men eru avbjóðingar við t.d. dokkingum og farmaflutningi á útoyggj, vantar kapasitetur í flotanum, og tað er ein trupulleiki.

Strandferðslan hevur tí fleiri ferðir seinnu árini heitt á myndugleikarnar um at fáa til vega pening til ein avloysarabát, so Strandferðslan til fulnar kann liva upp til sínar skyldur í lógini um fólka- og farmaflutning í Føroyum.

„Vit hava gjørt vart við okkum, tí vit síggja, at við verandi rakstrargøgnum er heilt ómøguligt at fáa atlit og skyldur at ganga upp í eina hægri eind. Hetta sæst væl á ónøgdini, sum tekur seg upp, tá skip mugu takast úr regluligu siglingini stutt tíðarbil," sigur Hilmar Eliasen.

Strandferðslan væntaði, at tá peningurin til eina nýggja Nólsoyarferju varð tikin av fíggjarlógini, fór ein partur av upphæddini at verða brúktur til at keypa ella byggja avloysarabátin, sum so stórur tørvur leingi hevur verið á. Men enn er hetta ikki hent.

„Avloysarabáturin er tann brikkurin í puslispælinum, sum vantar til tess at kunna røkja flutningsskylduna til fulnar, og vit hava víst á fleiri møguleikar at loysa trupulleikan. Okkara tilmæli er at byggja ein nýggjan glastrevjabát til 110 ferðandi, ið siglir 28 míl," sigur Hilmar Eliasen.

## TANN BESTI MØGULEIKIN

Í brævi til Samferðslumálaráðið 18. juli í ár setir Strandferðslan upp fleiri møguleikar, ið kunnu hugsast at vera brúkiligir. Ein loysn er at keypa ein brúktan bát, men krøvini um m.a. stabilitet, ið komu í gildi í 1998 við seinni broytingum í 2006, eru so strong, at tað neyvan loysir seg.

Strandferðslan nevnir í brævinum tveir brúktar bátar, Silju Star, sum hevur pláss til 48 ferðandi og gongur 28 míl, og Jósup, sum hevur pláss til 98 ferðandi og eisini gongur 28 míl. Hesir bátar kunnu keypast fyri ávíkavist 7 og 7,5 mió. kr. Báðir hesir bátarnir eru glastrevjabátar.

Strandferðslan hevur eisini kannað møguleikan at byggja ein nýggjan bát úr stáli, sum líkist Jósup. Hann kostar 10,8 mió. kr. at byggja. Pláss er tá fyri 70 ferðandi, og hann siglir 14 mál. Ein nýggjur glastrevjabátur við plássi fyri 110 ferðandi, sum siglir 28 míl, kostar 9 mió. kr. at byggja.

„Vit mæla Samferðslumálaráðnum til at fremja hesa seinastu loysnina. Tilmælið grunda vit á, at Strandferðslan kann vera við til at innrætta bátin soleiðis, at hann tænir sínum endamáli so væl sum gjørligt. At byggja ein rúmligan bát er t.d. neyðugt fyri inniluftina," sigur Hilmar Eliasen.

> »Avloysarabáturin er tann brikkurin í puslispælinum, sum vantar

At Strandferðslan mælir til at byggja ein glastrevjabát heldur enn ein bát úr stáli, kemst ikki minst av ferðini. Glastrevjabáturin gongur 28 míl og stálbáturin bara 14 míl. Glastrevjabáturin skal ikki setast í fasta sigling, men burturav brúkast sum avloysarabátur.

## TEY MONGU KRØVINI

Strandferðslan hevur mong atlit at taka, samstundis sum reiðaríið skal liva upp til krøvini í lógini um fólka- og farmaflutning. Vanta rakstrargøgn, eins og støðan er nú, eru beinanvegin avbjóðingar, og reiðaríið hevur ov lítið spælirúm at tillaga ferðaætlanina í eini knappari vend.

Fólk krevja, at skipini skulu sigla, tá tey eiga, men samstundis skal Strandferðslan halda alskyns ásetingar, eitt nú um hvílitíð hjá manningunum, regluligt eftirlit og bjargingarvenjingar nærum hvørja viku. Haraftrat koma óvæntað viðlíkahald, tí skipini eru lutfalsliga gomul.

„Tá eitt ferðafólk upplivir, at eitt skip ikki siglir sambært ferðaætlanini, ger tað vart við sína ónøgd, og tað er væl skiljandi. Men er neyðugt við t.d. umvælingum, mugu tær gerast. Tað áliggur okkum sum stovni at røkja landsins ognir so væl sum yvirhøvur gjørligt," sigur Hilmar Eliasen.

Eitt dømi um, hvussu bráðfeingis støður kunnu taka seg upp, sæst í september í ár, tá tríggjar ferjur skuldu umvælast. Bæði Sildberin, Ternan og Ritan vórðu ymisk tíðarskeið tikin úr sigling, og samstundis sigldi Smyril við trimum motorum, tí tann fjórði varð umvældur umborð.





# Áhaldandi **ábøtur** farnu árini

Leiðslan á Strandferðsluni hevur farna hálva triðja árið lagt stóra orku í at fremja neyðugar broytingar og umskipanir á stovninum. Nýggj skipan innan fíggjarstýring er tikin í brúk, ábyrgdarøkini hjá leiðarum eru betur skipað, og stovnurin hevur tillagað seg strong altjóða krøv

Avbjóðingarnar hava verið nógvar og stórar á Strandferðsluni, síðan fitt av almennum rumbli var um stovnin í 2014, men nógvar av avbjóðingunum eru síðan loystar. Eitt slag av undantaksstøðu valdaði, tá verandi leiðsla tók við, so høvuðsuppgávan var at leggja virksemið hjá stovninum í trygga legu.

M.a. hevur fíggjardeildin lagt um frá skipanini Navisión til Fíggjarskipan Landsins, og hetta kravdi nógva orku av starvsfólkunum.

Starvsøkini á ymsu deildunum eru eisini betur skipað, so Strandferðslan skal kunna røkja allar sínar skyldur so væl sum gjørligt samsvarandi teimum lógarásettu krøvum, sum áliggja stovninum.

## STRANGARI KRØV

Nýggjar hvílitíðarreglur samsvarandi Maritime Labour Convention eru komnar í gildi, og hetta hevur sett stór krøv til at umleggja vaktar- og arbeiðsætlanir umborð á øllum skipunum. Umsitingin av International Safety Mangement, sum frammanundan varð útveitt til annað reiðarí, er nú aftur á Strandferðsluni, og hetta krevur sítt.

Roknskaparreglugerðin er dagførd fyri fyrstu ferð í 8–9 ár. Somuleiðis eru aðrar reglugerðir og mannagongdir á stovninum dagførdar. Á starvsfólkaøkinum eru mannagongdir við m.a. innleiðsludøgum og HR-menning sett í verk. Stovnurin var eisini sera virkin, tá álit skuldi skrivast fyri politiska myndugleikan um at útveita tænastur hjá stovninum undir seinastu samgongu.

## NÝGGJ GRANNSKOÐAN

Frá 2015 hevur Landsgrannskoðanin staðið fyri at grannskoðað stovnin. Fyrstu frágreiðingina, har Strandferðslan varð umrødd, læt Landsgrannskoðanin úr hondum herfyri. Nøkrum viðurskiftum fanst grannskoðanin at, serliga tilíkum, sum høvdu vunnið siðvenju í fleiri ár, og sum hon vildi hava rættað.

Strandferðslan hevur tikið tær viðmerkngar, sum Landsgrannskoðanin hevði, til eftirtektar, og tá fjølmiðlarnir umrøddu tær, svaraði Hilmar Eliasen, stjóri, alment upp á spurningar tí viðvíkjandi. M.a. varð hetta gjørt í Degi & Viku. Samanumtikið heldur leiðslan, at ábøturnar, sum framdar eru á stovninum, hava lagt virksemið í eina betri og tryggari legu.

„Vit hava verið fyri stórum broytingum og umskipanum seinastu 2–3 árini, og til ber at siga, at vit hava áhaldandi verið í eini broytingartíð. Men starvsfólkini hava verið tolin og loyst uppgávurnar sera væl. Vit halda fram at optimera skipanir og mannagongdir so hvørt, sum virksemið og tíðin krevja tað," sigur Hilmar Eliasen, stjóri.

# Marin **stýrir ferðsluni** kring landið

Sum ferðslusamskipari á Strandferðsluni hevur Marin Hentze Gaardlykke nógvar bóltar í luftini. Hon kannar morgun og kvøld, um veðrið er til vildar hjá skipum og bussum at sigla og koyra, og mugu túrar avlýsast, boðar hon ferðafólki, miðlum og skúlum frá avlýsingini. Ikki altíð eru fólk nøgd, men Strandferðslan má seta trygdina fremst, tá tað krevst, sigur hon



Marin Hentze Gaardlykke er ferðslusamskipari á Strandfaraskipum Landsins. Er ringt veður í væntu, skal hon tíðliga á føtur at boða frá avlýsingum

Hon er 35 ára gomul, ættað úr Vági og fer hvønn gerandismorgun úr Vági kl. 07.30 til arbeiðis á høvuðsskrivstovuni á Tvøroyri, har hon er til kl. 16.00.

Men hennara arbeiðsuppgávur røkka langt út um vanliga arbeiðstíð. Sær hon um kvøldið, at ringt veður er í væntu, fer hon til songar kl. 21.00, og hon er aftur á fótum kl. 04.30. Tá er hon tøk at taka ímóti boðum um møguligar avlýsingar.

Talan kann vera um at avlýsa fráferðina hjá Smyrli av Krambatanga kl. 06.00. Manningin er á brúnni longu kl. 05.00 og kannar veðurlíkindini. Eru tey ivasom, boðar skiparin Marini frá, at túrurin kann verða avlýstur. Hon bíðar so eftir endaligum boðum.

„Ger skiparin av at avlýsa túrin, geri eg skjótt av," sigur Marin Hentze Gaardlykke. „Eg sendi sms-boð av telduni heimanífrá til ferðafólkini, sum eru í skipanini, og sendi kunngerðir til Kringvarpið og Rás 2. Bussførarar fáa eisini boðini, so teir kunnu fara aftur eftir fólkunum, teir hava sett av. Leiðslan og Farstøðin verða eisini kunnað, og á heimasíðuni verður broytingin fráboðað."



### VEÐURKØN SUM FÁ

Marin er veðurkøn sum fá, tí hvønn dag fylgir hon gjølla við heimasíðum, sum vísa, hvussu veðrið verður í Føroyum. Hon kannar m.a., hvat *dmi.dk, yr.no, theyr.com, belgingur.is, storm.no* og *windity.com* siga um veðrið. Við hesum upplýsingunum og dagføringum og vevmyndum hjá Landsverki fær hon eina góða heildarmynd av, hvussu veðrið verður.

„Ymiskt er, hvussu ættirnar ávirka ymsu sjóleiðirnar, men fylgir tú væl við, fært tú eina góða fatan av, hvar avbjóðingarnar verða. Fyri bussføringina kunnu bæði vindur og hálka vera ein bági. Er vindurin 30 metrar um sekundið, avlýsa vit, tí bussar kunnu koppa í nógvum vindi. Er ikki koyrandi fyri hálku ella kava, verður eisini avlýst," sigur Marin. Hentze Gaardlykke.

> »Avlýst verður ongantíð uttan grund

### SKILIR ÓNØGDINA

Avlýsingar koma ongantíð væl við hjá ferðafólkum, tí tey líta á, at ferðætlanin verður hildin. Talan kann vera um næmingar, sum skulu í skúla, ella fólk, sum skulu viðgerast á sjúkrahúsi. Eisini kann vera talan um fólk, sum skulu uttanlands við flogfari.

Marin skilir, at fólk eru ónøgd, men avlýst verður ongantíð uttan grund, og tá avbjóðingin er íkomin, skal hon loysast.

„Nógv fólk í Føroyum hava eina meining um veðrið, og summi rópa í telefonini, tá tey eru ónøgd. Tá ræður um at anda djúpt inn, telja upp í 10 og greiða frá støðuni. Onkuntíð siga fólk, at siglandi er á eini farleið, har vit hava avlýst, og tað passar kanska, men trupulleikin kann vera, at vónleyst er at leggja at. Tá má bara bíðast, til veðrið batnar," sigur hon.

Bussarnir hjá Bygdaleiðum flyta nógv skúlabørn millum býir og bygdir hvønn gerandismorgun, og avlýsa bussarnir, ber Marin skjótt at.

„Tá ringi eg til skúlarnar og boði frá, at ongin koyring er, og skúlarnir avlýsa ofta skúlagongdina, til aftur er koyrandi. Avgerandi er, at hetta samskiftið fer fram, áðrenn fólk fara heimanífrá, so lýsast kann alment við avlýsingunum í góðari tíð," sigur Marin Hentze Gaardlykke.

### ÚTBÚGVIN Í KUNDARØKT

Marin er væl brynjað til at røkja sambandið við viðskiftafólk. Hon hevur akademiútbúgving á bachelorstigi í kundarøkt av Copenhagen Business Academy, og praktiskar royndir hevur hon av Hotel D'Angleterre í Keypmannahavn, har hennara uppgáva var at tryggja tænastustigið.

Upprunaliga ætlaði hon sær tó aðrar vegir. Tá hon var liðug sum studentur í 2000, sigldi hon í eitt ár sum kokkur við Nærabergi og royndi seg eisini sum tænari við Norrønu. Í 2004 fór hon á kokkaskúla í Keypmannahavn og varð liðug við útbúgvingina í 2008. Meðan hon gekk har, arbeiddi hon í Føroyahúsinum og var skrivari hjá MFS.

„Ein blóðtøppur í beininum hevði við sær, at eg fekk ikki arbeitt sum kokkur, og tí legði eg leiðina um. Akademiútbúgvingin snúði seg m.a. um, hvussu tú veitir rætta tænastu, hvussu kærur skulu handfarast, og hvussu tú skalt hava eina empatiska tilgongd til kæraran. Hesin lærdómur kemur væl við, nú eg eri ferðslusamskipari," sigur Marin Hentze Gaardlykke.

### ONGANTÍÐ FRÍ

Hóast hon hvønn arbeiðsdag fer av skrivstovuni á Tvøroyri kl. 16.00, hevur hon ikki frí, tí boð kunnu altíð vera eftir henni.

Hetta ávirkar tey val, hon ger í gerandisdegnum, og hon syrgir fyri ikki at vera ov bundin. Í einum føðingardegi kann telefonin ringja við boðum um eina avlýsing, og so má hon skunda sær heim til telduna og fáa borið røttu viðkomandi boðini.

„Eg kann standa við høvdinum niðri í kølidiskinum í einum handli og granska ein høsnarunga, tá skiparin á Teistanum ringir og sigur, at hann má avlýsa, tí hann fær ikki lagt at í Hesti. Soleiðis eru treytirnar, og eg klagi ikki. Mær dámar væl at hava nógvar bóltar í luftini í senn," sigur Marin Hentze Gaardlykke.





> »68 uppringingar, túsundtals sms-boð og óteljandi teldupostar

# Tá ódnin brast á 10. september

**Leygarmorgunin 10. september í ár var sera nógvur vindur um alt landið, og 70 stormskaðar vórðu fráboðaðir. Á Strandferðsluni var dagurin sera avbjóðandi, og ferðslusamskiparin, Marin Hentze Gaardlykke, mátti boða frá avlýsingum í hóptatali**

Hon var á fótum longu kl. 03.00, tí hon vaknaði av hørðu hvirlunum, og tað fyrsta, hon gjørdi, var at kanna veðurstøðirnar á heimasíðuni hjá Landsverki. Har sá hon skjótt, at veðrið fór at gerast verri, enn fráboðað var frammanundan.

Veðrið gjørdist óvanliga ringt. Um 65 m/s vórðu mátaðir á Fámjinsvegnum kl. 05.30, og meðalvindferðin var 40 m/s. Neyðugt gjørdist at avlýsa siglingina hjá Teistanum út í Hest, og Ternan avlýsti túrar til Nólsoyar. Eisini siglingin hjá Smyrli varð darvað.

Leiðirnar 100, 300, 400, 410, 700, 701 hjá Bygdaleiðum máttu somuleiðis avlýsa fleiri túrar. Marin boðaði frá broytingunum á heimasíðuni og umvegis sms-boð til ferðafólkini. Listin yvir fráboðanir á *www.ssl.fo* var langur hendan morgunin.

„Frá kl. 05.30 til kl. 10.00 ringdi eg sjálv 37 ferðir til fólk ymsastaðni og fekk 31 uppringingar. Tilsamans hevði eg 68 samrøður, samstundis sum eg skuldi skriva sms-boð og fráboðanir á heimasíðuna. Fleiri túsund sms-boð vórðu send," sigur Marin.

Út á fyrrapartin skrivaði ferðslusamskiparin á heimasíðuna hjá Strandferðsluni: „Veðrið er batnandi, og væntast kann, at koyring og sigling eru komin í rættlag aftur um middagsleitið. SSL heitir á ferðafólk um at fylgja við her á heimasíðuni. Kunning um koyring og sigling verður javnan dagførd."

### UMFATANDI AVLEIÐINGAR

Ódnarveðrið kom ikki heilt óvart á Strandferðsluna. Longu dagin fyri varð fyrsti túrurin hjá Smyrli av Krambatanga avlýstur fyri veður. Hinar leiðirnar vórðu avlýstar, tá bussførarar, skiparar og ferðslusamskiparin høvdu tosað saman leygarmorgunin.

So nógvur vindur var, at fýra endar hjá Smyrli slitnaðu um náttina, og bæði farmastøðin og farstøðin á Tvøroyri fingu skaða. Kl. 13.15 tosaði Marin Hentze Gaardlykke við útvarpið. Hon upplýsti tá, at ivi nú bara var um Skúvoyarleiðina.

Flogferðslan varð eisini darvað av ringa veðrinum, og streymurin fór fleiri staðni. Eisini varð fartelefonnetið órógvað. Ódnarveðrið var tað ringasta í fleiri mánaðir eftir eitt óvanliga gott summar.

„Støðan var álvarslig, tí hvirlurnar vóru sera harðar, og annað var ikki at gera enn at avlýsa nógvar túrar til middags. Aftrat teimum 68 uppringingunum og túsundtals sms-boðunum sendi eg óteljandi teldupostar, meðan kunningartørvurin var størstur. Tað var avbjóðandi, men alt gekk væl og skjótt," sigur Marin Hentze Gaardlykke.

# Ganga mongum **serynskjum** á møti

Fasta ferðaætlanin er løgd eftir tí tørvi, sum er undir vanligum umstøðum. Men eru umstøðurnar óvanligar, og fyriskiparar hava serynskir, gongur Strandferðslan teimum ofta á møti. Hetta hendir m.a., tá ovastevna er í Nólsoy, steypafinala er í Havn, ella útoyggjastevna er




KÍ-viðhaldsfólk á veg umborð á Smyril í Klaksvík 27. august í ár sambandi við steypafinaluna á Tórsvølli ímóti Víkingi

»Tilsamans 975 KÍ-fjepparar fóru umborð í Klaksvík og sigldu til Havnar í bláum og hvítum

Tey, sum hava verið á ovastevnu, vita, at sera nógv fólk kann vera við Ternuni, tá hon siglir aftur og fram millum Havnina og Nólsoy. Í ár flutti Ternan 4.511 fólk aftur og fram millum stevnubygdina og høvuðsstaðin fríggjadag, leygardag og sunnudag.

Samstarvið millum Strandferðsluna og ovastevnunevndina var fyrimyndarliga gott. Farið varð longu í mai undir at leggja ferðaætlanina til stevnuna, so hon skuldi samsvara við skránna. Strandferðslan og nevndin høvdu tríggjar fundir undan stevnuni og ein aftaná.

Hjá Strandferðsluni er serliga hugaligt at ganga serynskjum á møti, tá fyriskipararnir vita, hvat teir ætla, og fara í gongd í góðari tíð. Tá ber væl til at laga ferðaætlanina eftir ynskjunum, men verri er, um ongar stundir eru, tí tá er trupult at broyta t.d. vaktir hjá manningum.

Í sambandi við útoyggjastevnurnar hevur Strandferðslan ofta lagað sigling og busskoyring eftir ynskjunum, ið fyrireikararnir høvdu. Hetta varð eisini gjørt, tá Syðradalur fylti 200 ár í ár. Tá varð busskoyringin lagað til tiltakið.



Í ár flutti Ternan 4.511 fólk aftur og fram millum Havnina og Nólsoy í sambandi við ovastevnuna



### FEGIN BORGARSTJÓRI

Ein nógv umrøddur eykatúrur í ár var túrurin hjá Smyrli úr Klaksvík til Havnar í sambandi við steypafinaluna í fótbólti millum KÍ og Víking á Tórsvølli 27. august. Klaksvíkar kommuna og KÍ vildu hava Smyril at sigla fjepparar til Havnar, hóast koyrandi er, og Strandferðslan eftirlíkaði hesum.

Tilsamans 975 KÍ-fjepparar fóru umborð í Klaksvík og sigldu til Havnar í bláum og hvítum at hyggja at finaluni. KÍ vann finaluna eftir umdyst og brotssparkkapping. Ferðin úr Havn varð í tveimum umførum útsett, tí avgerðin á vøllinum dró út. Hetta varð fráboðað á Tórsvølli undir dystinum.

Klaksvíkingar vóru sera væl nøgdir við møguleikan at kunna sigla til finaluna. Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Jógvan Skorheim, takkaði í almennum skrivi Strandferðsluni fyri at hava gjørt túrin møguligan, ikki minst tí hann hevði týdning fyri trygdina hjá mongu fjepparunum.

„Tað var ógvuliga hugaligt at uppliva tykkara professionella arbeiðshátt og jaliga hugburð, tá eg longu dagin eftir hálvfinalusigurin á NSÍ setti meg í samband við tykkum við fyrispurningi og áheitan um at leiga Smyril til stóra finaludagin,“ skrivaði borgarstjórin.

Hann helt, at Strandferðslan hevði borið seg fyrimyndarliga at sum tænastuveitari, tí heilt frá byrjan var stovnurin kvikur at svara teimum spurningum, sum klaksvíkingar høvdu. Leiðsluni gav hann boð um at heilsa og takka manningini á Smyrli fyri gott arbeiði.





# Kópakonan dregur fólk í Kalsoynna

Standmyndin í Mikladali er so væl umtókt, at ferðafólkatalið við Sam í Kalsoynna er vaksið almikið síðan 2014. Avbjóðandi er at taka ímóti øllum fólkunum, men gongdin vísir, at list og søgusiging kunnu skapa stóran ans millum ferðafólk fyri føroyskum smáplássum

Skipini sigla hvønn dag, og bussarnir koyra, so lætt skal vera at koma runt í landinum. Jú meira er at fara til kring landið, jú meira verður ferðast, og hetta er standmyndin hjá Hans Paula Olsen, myndahøggara, av Kópakonuni besta dømið um.

Ætlanin var allatíðina, at standmyndin á Stórakneysa skuldi fáa fleiri fólk í Kalsoynna. Átakið eydnaðist so væl, sum fá høvdu ímyndað sær. Heili 42.985 fólk sigldu við Sam í Kalsoynna frá januar til august í 2016. Sama tíðarskeið í 2014 var talið 25.782 fólk.

Stjórin á Visit Kalsoy, Oliver Thomsen, hevur alment sagt, at stóri vøksturin í ferðafólkatalinum hevur havt við sær, at mangan má bíðast eftir at sleppa umborð á Sam og runt í oynni, tí so nógv fólk og bilar eru. Hann ynskti sær betri busssamband.

Strandferðslan er varug við tørvin og er í sambandi við Klaksvíkar kommunu um málið. Ætlanin er at fáa útgreinað tørvin, áðrenn møguligar broytingar verða gjørdar í busskoyringini, sigur Marin Hentze Gaardlykke, ferðslusamskipari.

## HUGTAKANDI SØGA

Kópakonan varð avdúkað á stórari samkomu í Mikladali 1. august í 2014, tá borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu og landsstýrismaðurin við mentamálum hildu røður. Eivør Pálsdóttir sang undir liðini á standmyndini. Um 1.500 fólk vóru til staðar.

Søgan um Kópakonuna er ein hugtakandi søga, sum verður søgd á ymsan hátt í fleiri londum. Søgnin úr Mikladali sigur, at bóndin á Sunnanágarði tók hamin hjá vakrastu gentuni og goymdi hann, so hon ikki slapp aftur í hann, áðrenn sólin reis úr havi.

Kópakonan mátti heim við bóndanum og fekk børn við honum. Hóast hon var hjá bóndanum leingi, longdist henni aftur í havið. Ein dagin eydnast henni at sleppa í hamin, tí maðurin hevði gloymt kistulykilin í lásinum. Hann drap tí børn hennara.

Vreiði kom yvir bóndan, bygdina og oynna. So mong úr Kalsoynni skuldu sjólátast, at tey skuldu kunna sláa ring um alla oynna, sigur søgnin. Søgnin er sostatt ein sorgarsøga, sum eisini er ein áminning um, at ongin kann binda annan niður.

„Tíðarandanum at flyta av bygd í bý fáa vit ikki steðgað við at taka frælsið at velja frá fólki, eins og bóndin á Sunnanágarði gjørdi. Í so máta er einki broytt. Men júst verkætlanir sum hendan kunnu skapa meira lív í bygdini og allari oynni," segði Bjørn Kalsø, ið var landsstýrismaður við mentamálum í 2014.



# Á ferð við **fuglunum**

Fleiri enn 300 fuglasløg eru skrásett í Føroyum, men bara 20 eru í Føroyum alt árið. Øll hini flyta í onnur lond. Fuglarnir eru á ferð alt lívið, og ferðingin eigur lívið í teimum, tí teir mugu ferðast eftir, hvar føði og umstøður eru til vildar. Fleiri strandfaraskip bera fuglanøvn. Silas Olofson greiðir her frá teimum fuglum, sum skipini hava navn eftir



Tú sært fuglar allastaðni, har tú ferðast, og fuglar eru ofta ein áminning um árstíðirnar. Tjaldrið kemur á grækarismessu 12. mars. Tá vita vit, at vár og summar eru í hondum, men so fer tað aftur suðureftir um heystið.

Aðrir fuglar koma til Føroya í vetrarvist. Hetta eru ofta fuglar, ið eiga enn longri norðuri, eitt nú grágrælingur, havgás, ymisk dunnusløg og valmásar.

Strandferðslan gevur fólki møguleika at ferðast kring um í oyggjunum. Skipini hjá Strandferðsluni eru eins og fuglarnir ímynd um ferðing, og hóskandi er tí, at mong teirra hava fuglanøvn.



## SILDBERIN

Lundi, ið flýgur við nebbasild til pisu, verður róptur sildberi. Lundin er ein hin vanligasti búfuglurin í Føroyum, og mett verður, at føroyski stovnurin telur meir enn eina millión fuglar. Tó eru fáar pisur komnar undan í fleiri ár, men árið í ár hevur verið nógv betur enn undanfarin ár.

Lundin er sera eyðkendur við sínum reyða, gula og svarta nevi – og flestu ferðafólk, ið koma til Føroya, hava eitt stórt ynski um at síggja lunda.

Lundin grevur djúpar holur í svørðin, har hann reiðrast, og hesi øki verða rópt lundalond. Hann sæst í Føroyum um summarið og eitt sindur út á heystið. Gamalt var, at lundin hvarv aftaná fyrsta illveður í august, men nakrir fuglar verða verandi eitt sindur longri. Á vetri heldur lundin til á opnum havi.



## SMYRIL

Øll kenna skipið Smyril, men fleiri kenna kanska ikki fuglin. Hann er einasti veruligi rovfuglur, sum eigur í Føroyum. Mett verður, at eini 25 pør eiga kring oyggjarnar.

At síggja smyril er ikki gerandiskostur. Tó síggjast størri nøgdir av smyrli serliga á heysti, tá fuglar úr øðrum londum vitja okkum. Bøgan er brún um bakið og hevur myrkar rýpur um bringuna. Steggin, ið er munandi sjáldsamari at síggja, er blá-gráur um bakið og ljóst appilsingulur um bringuna.

Hóast smyrilin er lítil, er hann óførur at veiða. Tá hann fer sendandi eftir einum stara, verður mett, at ferðin kann vera 200 km/t. Onki er tí at undrast á, at starar gerast bebbaræddir, tá ein smyril er í hølunum á teimim. Dømi eru um, at starar leita sær skjól í húsum og millum fólk, tí teir halda, at fólk eru minni vandamikil enn smyril.





## TERNAN

Á latíni eitur ternan *sterna paradisaea*. Hetta merkir paradís-ternan. Kanska hava menn hugsað um ein eingil, tá teir hava sæð eina ternu standa pinnastilla í luftini, áðrenn hon kavar eftir eini nebbasild ella ternumurti. Ið hvussu er er ternan sera vøkur og eisini ein hin mest eleganti fuglurin, ið vit eiga í Føroyum, við sínum svarta skalla, hvíta kroppi og blóðreyða nevi og beinum.

Ternan er tað púra øvugta av teistanum, ið heldur til í Føroyum alt lívið. Ternan er millum teir fuglar, ið flyta longstu leið yvirhøvur, og hon ferðast allan vegin til Suðurpólin í vetrarvist.

Kanningar hava víst, at ternur ferðast meir enn 70.000 km um árið. Rokna vit saman, kann ein terna flúgva væl meir enn 2 milliónir kilometrar alt lívið. Tá vit síggja eina ternu, hyggja vit at einum fugli, ið hevur sæð støð og vitjað lond, ið vit bara kunnu droyma um.

Hjá ternuni er lívið stutt sagt at ferðast.



## RITAN

Hesin lítli, ljósi másafuglurin er sera fittur á at líta. Hann hevur svørt bein, gráan rygg, veingirnir eru svartir uttast, og nevið er gult. Hann eigur í bjørgunum, ofta hundraðtals ella túsundtals saman. Um veturin ferðast størsti partur av stovninum suðureftir, men onkrir eru við Føroyar.

Lætt er at síggja, hvar ritan eigur í bjørgunum, tí alt bergið verður hvítt av skvøtti. Gangurin av ritu kann vera ógvusligur, og gamalt er at siga, at tá nógvur gangur er, er tað sum í ritubergi.

Ritan hevði fyrr stóran týdning í føroyska húsarhaldinum, tí hon er góð at eta. Tað sigst, at menn vóru so grammir at fáa ritu at eiga í bjørgunum, at teir hava málað minni partar av bjørgunum hvít, so ritur skuldu halda, at har var rituberg.



## TEISTIN

Teistin, sum hevur givið Sandoyarferjuni navn, liggur so fittur og vaggar fram við sjóvarmálanum. Hetta er svartur og hvítur fuglur við reyðum beinum. Viðhvørt kavar hann, og er hann heppin, kemur hann upp við eini tarabrosmu ella onkrum øðrum góðum av havsins matarskrá.

Summum fólkum dámar at ferðast víða, t.d. til New York, Barcelona ella Ulaanbaatar. Onnur eru lokal, tí best er at vera í tí kenda. Soleiðis er teistin. Hann er lokalur. Tann føroyski teistin ferðast ikki millum lond. Hann hevur verið lokalur so leingi, at hann er vorðin eitt serstakt undirslag, sum bert livir í Føroyum. Munur er sostatt á teistunum í Føroyum og teistum í londunum kring okkum.

# Tróndur røkti leingi Skálafjarðar-siglingina

Tey, sum minnast 40-50 ár aftur í tíðina, vænta kanska framvegis at síggja strandfaraskipið Trónd millum oyggjarnar, tí í mong ár var hann daglig sjón á firðunum. Best kendur var hann sum skipið, ið knýtti Havnina og Skálafjørðin saman og seinni Havnina og Sandoynna. Nú eru undirsjóvartunlar í væntu á báðum leiðunum






Samferðslukervið í Føroyum hevur áhaldandi verið útbygt farnu hálvu øldina, tí fólk vildu hava so høgligar ferðamøguleikar millum oyggjarnar sum gjørligt. Vegirnir gjørdust betri og betri, fyrra helming av 60'unum komu fyrstu tunlarnir, og so hvørt sum samfelagið mentist, gjørdust skipini eisini betri og størri.

Siglingarleiðin millum Skálafjørðin og Havnina var ein sjálvsagdur ferðamøguleiki í mong ár. Meiaríið í Havn stóð frá 1908 fyri hesi sigling, og tiltiknir vóru mjólkarbátarnir Ruth, Tróndur og Sigmundur. Í 1967 keypti Meiaríið bilferjuna Smølu úr Noregi, sum fekk navnið Tróndur. Strandferðslan yvirtók Trónd í 1974.

Túrurin millum Havnina og Skálafjørðin var ikki drúgvur, og farvatnið var betri enn eitt nú Fugloyarfjørður og Suðuroyarfjørður í ringum veðri. Tróndur legði at á Bursatanga í Havn og á Toftum. Hann sigldi eisini á Hulk á Strondum. Í 1993 varð Tróndur settur í sigling millum Gomlurætt og Skopun, og í 2002, tá Teistin var komin, varð hann seldur.

Føroyar broyttust nógv frá tí, at Tróndur kom til landið í 1967. Bilatalið øktist við rúkandi ferð í 70'unum og 80'unum, og skuldi tú í bili millum Havnina og Eysturoynna, mátti tú eftir Oyggjarvegnum, eisini í hálku og kavaroki. Eitt stórt framstig á hesi leið var, tá tunnilin millum Kaldbaksbotn og Signabø var liðugur í 1992.

Siglingarleiðin gjørdist sum fráleið mestsum óneyðug, og frá 2019 fer neyvan nakar at spyrja eftir skipi á hesi leið aftur, tí tá skal Eysturoyartunnilin ætlandi vera skotin ígjøgnum. Tunnilin kemur upp í trimum støðum – við Hvítanes, í Runavík og á Strondum. Sandoyartunnilin skal ætlandi vera skotin ígjøgnum í 2021.



# **Við Rituni til** Svínoyar og Fugloyar

Ritan var eitt framstig, tá hon avloysti Másan á leiðini millum Hvannasund, Svínoy og Fugloy í 2010, men avbjóðandi kann vera at leggja at, tá ókyrt er. Baksið verður afturlønt, tá tú ert komin upp á pláss, tí friðurin á útoyggj er góð sálarbót. Vitjast kann m.a. í søguríku kirkjunum



Kirkjan í Hattarvík

Fólkatalið í Svínoy og Fugloy er nógv minkað seinastu áratíggjuni, men seinnu árini er ferðasambandið vorðið betur, tí fyri seks árum síðan mátti Másin lúta, og Ritan, sum í mong ár røkti siglingina millum Havnina og Nólsoy, avloysti 60 ára gamla træskipið.

Másin varð bygdur á Tórshavnar Skipasmiðju í 1959. Hann fór av bakkastokki 7. november hetta árið. Fyrst sigldi hann millum Klaksvík og Haraldssund og seinni millum Havnina, Nólsoy, Hest og Sandoynna. Frá 1972 fór hann at røkja siglingina til Svínoyar, Fugloyar og Viðoynna.

Baldrutir kundu túrar við Másanum vera, tá hann í havalduni skuldi vinna yvir á Kirkju, men góðveðursdagar vóru túrarnir bæði hugtakandi og hugnaligir. Hjá bygdarfólkinum í Svínoy og Fugloy var skipið í mong ár alneyðuga sambandið við umheimin.

## STYTTRI SIGLINGARTÍÐ

Nú røkir Ritan siglingina, og hon var eitt framstig, tí Ritan er stálskip, sum er væl størri enn Másin, komforturin umborð er betri, og siglingartíðin er styttri. At fáa vøru og tilfar í land, serliga tá ókyrt er, krevur tó framvegis hegni og umhugsni hjá manningini.

Ritan varð bygd í Hollandi síðst í sekstiárunum, og hon fór at sigla millum Havnina, Nólsoy, Hest og Sandoynna í 1972, tá Másin helt uppat á teirri leiðini. Ritan hevur sostatt tvær ferðir við nærum 40 ára millumbili avloyst Másan í strandfarasigling.

Nógv ferðafólk er við Rituni um summarið, bæði føroysk og útlendsk. Alsamt betur umókt er vorðið at fara á útoyggj at uppliva friðin og náttúruna, sum stórpláss ikki kunnu bjóða á sama hátt. Í juli í ár sigldu 3.391 fólk við Rituni. Í januar var talið 417.

## ÁHUGAVERD KIRKJUSØGA

Onki er at siga til, at ferðafólk vilja uppliva oyggjar sum Svínoy og Fugloy, tí ikki bara eru plássini náttúrurvøkur – tey eru eisini søgurík. Í hesum sambandi er kanska serliga vert at nevna kirkjurnar í Svínoy, á Kirkju og í Hattarvík, sum mong vitja.

Kirkjan í Svínoy stendur oman fyri bygdina. Hon varð bygd árini 1877 til 1879, og á kirkjuspírinum stendur, at hon er frá 1878. Hon er laðað úr kílaðum gróti og kom í staðin fyri eina eldri kirkju, sum var illa farin av tíðarinnar tonn.

Í Fugloy var fyrr í tíðini bara kirkja á Kirkju, men í 1818 gekk báturin í bygdini, sum flestu menninir róðu út við, burtur, og tað var dyggur smeitur fyri bygdina. Nakað seinni gjørdi amtmaðurin av, at nýggj kirkja skuldi byggjast í Hattarvík, tí ongin maður var at røkja hana á Kirkju.

## JÁKUP DAHL VÍGDI

Kirkjan í Hattarvík varð vígd í 1833. Góð 65 ár seinni var hon í so ringum standi, at avrátt varð at byggja nýggja kirkju í býlinginum niðri í Húsi. Hon varð vígd í 1899. Nú gingu fleiri áratíggju, áðrenn kirkja aftur varð bygd á oynni. Hon kom á Kirkju í 1933 og stendur enn.

Hendan kirkjan kom í sambandi við, at 100 ár vóru liðin, síðan kirkjan kom í Hattarvík í 1833. Grivið varð fyri grundini og laðað, og træsmiðir gjørdu stórviðin til. Tá grundin var liðug, var so skjótt, at kirkjan var innilokað. Nógv arbeiði varð gjørt ókeypis.

Louis Zachariassen teknaði kirkjuna á Kirkju. Tær vóru ein gáva til kirkjuna. Petur Pauli Poulsen stóð fyri at laða grundina, og fyri træsmíðnum stóð Jóannes Kristensen í Mittúni. Kirkjan varð vígd 28. mai í 1933. Jákup Dahl, próstur, vígdi hana, verður upplýst á *folkakirkjan.fo*.



# **Tvær vikur** gjørdust til **30 ár**

Í mars 1987 ringir telefonin hjá Ásbirni Matras. Tað er Sólvit Simonsen, sáli, táverandi skipari á Sildberanum, ið spyr, um Ásbjørn kann loysa av í tvær vikur umborð á Sildberanum sum stýrimaður. Ásbjørn játtaði, og hesar báðar vikurnar mundu roynast væl, tí í mars næsta ár fer hann frá vegna aldur, eftir at hann í samfull 30 ár hevur staðið við róðrið á Sildberanum



»Vit fáa alt slag av fólki umborð, ið plaga at lata væl av nýggja skipinum

Ásbjørn er føddur við Gjógv og fór sum ungir dreingir flest tá tíðini til skips eftir lokna skúlagongd. Hann royndi undir Føroyum sum fiskimaður og fann sær konu á Sandi, hagar hann flutti. Har býr hann enn miðskeiðis í bygdini. Hann fekk kjans í Grønlandi, og har var hann, til hann fór á skiparaskúla seint í 1970-unum.

„Eg hevði tíbetur lagt mær eitt sindur av pengum til síðis, tí lestrarstuðulin var ikki meira enn einar 600 krónur um mánaðin, og tað er ikki nógv at liva fyri hjá manni við konu og tveimum børnum," sigur hann.

Ásbjørn fekk innivist hjá beiggja sínum í Havn, meðan hann las. Eftir lokna skúlagongd fór hann aftur til Grønlands til fiskiskap, nú sum skipari, til hann hin lagnudagin í 1987 fekk boðið at mynstra umborð hjá Strandferðsluni.

## TILKALLING GER STÓRAN MUN

Í dag búgva um 20 fólk í Skúvoynni, men Ásbjørn minnist, tá oyggin hevði væl fleiri íbúgvar, og Sildberin førdi fleiri fólk enn nú.

„Vit høvdu pendlarar síðst í 80-unum, tí vit førdu hvønn dag fólk til arbeiðis á flakavirkinum á Sandi. Og miðskeiðis í 90-unum vóru umleið 15 skúlabørn í oynni, sum tíverri er skúlin nú niðurlagdur, tí ongi børn eru eftir í oynni," sigur Ásbjørn Matras.

Tá Ásbjørn byrjaði, skuldi Sildberin sigla hvønn túr í ferðaætlanini, og nógvar túrar sigldi hann tómur.

„Tað var rættiliga keðiligt at damla um fjørðin við ongum fólki, og tá vit komu út í oynna, var heldur ongin, ið skuldi við. Tí meti eg, tað var ein sera skilagóð avgerð hjá Strandferðsluni at seta tilkallitúrar inn," sigur Ásbjørn.

## MANGUR BALDRUTUR TÚRUR

Fyri tveimum árum síðan kom nýggjur Sildberi til Skúvoyarleiðina, og Ásbjørn heldur, at tað er sum dagur og nátt at sigla við hesum báðum skipunum.

„Gamli Sildberin var eitt gott sjóskip, og hann passaði væl til kaiina í Skúvoy, men komforturin fyri ferðafólkini var ikki góður, tí hann rullaði illa," sigur Ásbjørn, ið hevur verið mangan baldrutan túr um Skúvoyarfjørð.

„Ein túrur við gamla Sildberanum plagdi at taka eini fimm korter, men vit hava verið onkran túr, ið hevur tikið einar 2 tímar, og tá hevur ikki altíð verið so tespiligt hjá ferðafólki at siglt við," sigur Ásbjørn.

## VENDI GRÁTANDI INNAFTUR

Strandferðslan hevur avgreiðslumann í Skúvoynni, sum metir um líkindini at leggja at. Veðurviðurskiftini kunnu tó vera soleiðis, at væl kann vera siglandi, men lítla løtu seinni kann vera vent í holuni, og leggjast kann ikki at. Ásbjørn sigur, at hetta skapar sjálvandi ikki nøgdsemi millum ferðafólkini, og serliga minnist hann eitt ferðafólk á einum heldur baldrutum túri.

„Ein genta var komin allan vegin úr Streymoynni við bussi og skuldi til Skúvoyar. Vit gjørdu klárt at fara og bóðu hana leggja seg í koyggjuna í stýrihúsinum, tí vit vistu, at hetta fór at verða ein baldrutur túrur. Tá vit so koma til Skúvoyar, síggja vit, at her fer ikki at bera til at leggja at, tí nú var so nógv brim. Gentan fór at gráta, tá vit vendu við aftur, og hon lovaði, at hon kom ongantíð við okkum aftur. Hetta havi eg onkuntíð mint hana á," sigur Ásbjørn flennandi.

## NÓGV FERÐAFÓLK

Ásbjørn sigur, at mong ferðafólk koma við ein túr út í Skúvoynna um summarið, kanska serliga føroyingar.

„Vit fáa alt slag av fólki umborð, ið plaga at lata væl av nýggja skipinum, men mest føroyingar. Eg kundi tó hugsað mær fleiri fremmand ferðafólk. Føroysku ferðafólkini eru bæði einstaklingar og bólkar, t.d. skúlar og fyritøkur, ið eru á útferð," sigur Ásbjørn.

## EITT SERLIGT TILKNÝTI

Hóast Ásbjørn ikki hevur ættarbond til Skúvoyar, slepst ikki undan, at ein fær eitt serligt tilknýti til eina oyggj og hennara íbúgvar, tá ein hevur siglt har dagliga í 30 ár.

„Eg eri ikki í familju við nakran í Skúvoy, men eg eri komin at kenna øll rættiliga væl. T.d. er sjáldan ein jarðarferð í oynni, har eg ikki eri við," sigur Ásbjørn Matras.

Hann ætlar nú eftir 30 ár í tænastu hjá Strandferðsluni at njóta sítt otium at røkja ein haga í Sandoynni og at hugna sær við sínum børnum og trimum abbabørnum.




# Betri internet umborð á Smyrli

Leingi var internetsambandið á Smyrli svikaligt, tí signalið var ov veikt. Men ein nýggj mastur á Skálhøvda syrgir nú fyri, at 4G-sambandið riggar, sum tað skal

Øll skipini hjá Strandferðsluni uttan Ritan hava tráðleyst internetsamband, og vanliga er sambandið í lagi. Men ferðafólk við Smyrli hava ofta ilskast um, at sambandið kundi roynast illa. Hetta var serliga, tá nógv fólk vóru á netinum í senn.

Nú skuldu nettrupulleikarnir á Smyrli verið av, tí í heyst setti Føroya Tele eina nýggja sendimastur upp á Skálhøvda á Sandoynni fyri at bøta um dekningin eystan fyri Sandoynna. Masturin er 18 metrar høg, og eitt lítið hús er eisini bygt við mastrina.

„Áðrenn masturin kom á Skálhøvda, hevði Smyril bara samband við tvær mastrar – á Froðbiarnakki í Suðuroynni og á Eggjarkletti í Nólsoy. Ov langt var til hesar mastrarnar, og tí kundi sambandið vera veikt eystan fyri Sandoynna," sigur Jón Guttesen, KT-leiðari á Strandferðsluni.

Hann sigur, at KT-deildin hevur leingi verið greið yvir, at netsambandið á Smyrli var svikaligt, serliga tá nógv fólk var umborð, og tí heitti Strandferðslan á Føroya Tele um at fáa bøtt um sambandið á Suðuroyarleiðini.

„Vit fegnast um, at Føroya Tele játtaði umbønini, og at masturin er komin upp á Skálhøvda, tí hon var brikkurin, sum manglaði. Beinanvegin hon var komin upp, royndu vit netið, og tað riggaði væl. Nú gongur tað nógv skjótari," sigur Jón Guttesen.



### VIKNET

Ein onnur tænasta, sum ferðafólkini við Smyrli nú fáa ágóða av, er Viknet. Hendan tænastan gevur fólki høvi at síggja og hoyra sendingar hjá Kringvarpi Føroya ein mánað aftur. Allar sendingarnar eru í hágóðsku.

Skalt tú stytta tær um stundir við sendingunum hjá Kringvarpinum umborð á Smyrli, kann tað gerast bæði á teldli, farteldu og telefon, og tú skalt fara inn á **media.viknet.fo**

# The Public Transport Company of the Faroe Islands

Strandfaraskip Landsins (SSL) is a nationally owned transport company. The main objective for SSL is to provide transport to all corners of the Faroe Islands

SSL runs six ferries named Smyril, Teistin, Sam, Ritan, Sildberin and Ternan. All the ships are named after birds, and only Smyril, Teistin, Sam and Ternan are car ferries. The other ferries are passenger ferries only.

The ferry to Mykines is called Jósup. Jósup is privately owned as SSL has a contract with Sp/f Mykines for the route to Mykines. More info about this company can be found on www.mykines.fo.

SSL also runs multiple bus route which are all privately run by multiple Faroese bus companies.

The main office for SSL is situated on Suðuroy in the town Tvøroyri. The main ferry and bus terminal called Farstøðin is situated on the harbor in the capital Tórshavn.

SSL also runs three cargo stations situated in Krambatangi on Suðuroy, in Tórshavn next to Farstøðin and in Klaksvík.

Approximately 170 people are employed on our ferries, cargo departments, head office and route information.

Today we are under the Ministry of Transport and our minister is Mr. Henrik Old. More information about our ministry can be found on www.smr.fo

## Contact us

You can contact us 24 hours a day every day of the year on *00298 343030*, where we will answer all your route questions. Furthermore you are always welcome to contact us by e-mail on *fyrisiting@ssl.fo*

**MAIN OFFICE**

Sjógøta 5, Postbox 30
FO-810 Tvøroyri
Tel.: +298 343000
Fax: +298 343001
E-mail: fyrisiting@ssl.fo

*Opening hours*
Monday–Thursday 08:00–16:00
Friday 08:00–15:00

**ROUTE INFORMATION**

Tel.: +298 343030
Fax: +298 343003
*Replies 24/7*

**TERMINAL**

Tel.: +298 343030
Fax: +298 343003

*Opening hours*
Monday–Friday 08:00–16:00

**FREIGHT SERVICE**

Tel.: +298 343000
Fax: +298 343001
E-mail: farmur@ssl.fo

*Opening hours*
Monday–Friday 08:00–16:00




Lesið meira á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Hvat man hetta vera?

Fylg tølunum





## Finn 5 feilir







## Hvussu eita fuglarnir?

SMYRIL LUNDI TERNA RITA TEISTI



# Kanska tú veitst tað

**1. Nær varð Robert Kennedy skotin?**
a. 1963
b. 1967
c. 1968

**2. Hvør skrivaði sangin „Imagine"?**
a. John Lennon
b. Lennon-McCartney
c. Bob Dylan

**3. Nær kom heimastýrislógin í gildi?**
a. 1. oktober 1946
b. 1. januar 1948
c. 1. apríl 1948

**4. Hvussu eitur drangurin norðan fyri Gjógv?**
a. Heygadrangur
b. Búgvin
c. Báradrangur

**5. Hvør var amerikanskur forseti 11. september 2001?**
a. Bill Clinton
b. George Bush, yngri
c. George Bush, eldri

**6. Nær var KÍ FM-vinnari hjá monnum seinast?**
a. 1972
b. 1991
c. 1999

**7. Hvør skrivaði skaldsøguna "Bábilstornið"?**
a. Regin í Líð
b. Heðin Brú
c. Martin Joensen

**8. Hvussu eitur høvuðsstaðurin í Kanada**
a. Ottawa
b. Vancouver
c. Montreal

**9. Hvat merkir „je travaille" á fronskum?**
a. Eg syngi
b. Hon rennur
c. Eg arbeiði

**10. Nær yvirtók landið Smyril frá Mortensens monnunum?**
a. 1917
b. 1932
c. 1945

**LØTT**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | | | | | | 9 | 3 | |
| 1 | | | | 2 | | | 7 | |
| | 7 | 9 | | 3 | 1 | 6 | 8 | 2 |
| 6 | 8 | 5 | 1 | | | 7 | 2 | |
| | | | 9 | | 7 | | | |
| | 9 | 3 | | | 2 | 1 | 4 | 6 |
| 9 | 2 | 1 | 3 | 7 | | 4 | 6 | |
| | 5 | | | 9 | | | | 3 |
| | 4 | 6 | | | | | | 7 |

**MIÐAL**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | 8 | 7 | | 1 | |
| 2 | | 6 | | | | 4 | 7 | |
| | | | 2 | 4 | | | 8 | 6 |
| 8 | | 2 | | 9 | | 3 | | |
| | 6 | 4 | 3 | | 2 | 8 | 9 | |
| | | 3 | | 6 | | 7 | | 2 |
| 4 | 3 | | | 5 | 9 | | | |
| | 2 | 8 | | | | 9 | | 7 |
| | 9 | | 8 | 2 | | | | |

SVAR: 1. 1968 2. JOHN LENNON 3. 1. APRÍL 1948 4. BÚGVIN 5. GEORGE BUSH, YNGRI 6. 1999 7. REGIN Í LÍÐ 8. OTTAWA 9. EG ARBEIÐI 10. 1917

# Góða ferð í Føroyum!

Føroyar eru bergtakandi, og við skipum, bussum og tyrlum kanst tú vitja nærum hvønn blett í oyggjunum. Úr Sumba til Fugloyar kanst tú njóta vakra náttúru og hitta fryntlig fólk á ferð um firðir og fjøll. Fólk hevur búleikast í Føroyum í meira enn 1000 ár, og støðugt er landið ment og útbygt, eisini farleiðirnar kring oyggjarnar. Vit binda Føroyar saman við okkara fjøltáttaða virksemi, og vit gera tað við eldhuga og gleði.

*Góða ferð í Føroyum!*

STRANDFARASKIP
LANDSINS